ítróttur

Nr. 52 • týsdagur • 14. mars 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# IM-normur í 40 hitastigum

**Hóast hann hevur tikið samlaða føroyska talvheimin - og ivaleyst fleiri enn tað – fullkomuliga á bóli, so er Helgi Dam Ziska als ikki farin á flog. Málið var at vinna ein IM-norm, og tað er rokkið**

TALV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Superlativini verða oyst oman yvir unga havnarmannin, Helga Dam Ziska. 15 ára gamli telvarin, sum enn gongur í 9. flokki í Kommunuskúlanum, hevur staðið fleiri av veruligu tungvektarunum í altjóða talvheiminum kurl, og longu nú hevur hetta givið úrslit í næsta IM-norminum.

At hann so samstundis hevur verið seingjarbundin við upp ímóti 40 hitastigum á fepurpinninum, ger ikki avrikið minni áhugavert.



*Hálsturriklæði, tablettir og hostasaft hava verið fastur partur av ferðini hjá Helga í Reykjavík. Men hóast úti við 40 hitastigum í kroppinum - ella kanska júst tí - so tók tað honum bara 20 minuttir, áðrenn enski Lorin D'Costa varð sveipaður av borðinum*

*Mynd: Morgunblaðið*

### Vann við snartalvi

Soleiðis var tað í gjár akkurát so, at hann megnaði at vinna sær vegin fram til talvborðið. Klokkan við talvborðið var longu sett ígongd, tá Helgi – nakað nógv seinkaður – at enda hevði tikið støðu um, at hann vildi royna at telva. At sita í fleiri tímar yvir borðinum, var ikki hugsingur um, og tí gjørdi hann upp við seg sjálvan, at hetta bara mátti fáast frá hondini. Tað tók heldur ikki meira enn 20 minuttir, áðrenn talvið var greitt, og enn einaferð hevði Helgi gjørt bart. Eftir 20 leikum var Enski Lorin D'Costa koppaður.

Og við hálvum fimta stigi av átta møguligum, er Helgi á 30. plássinum í sterku kappingini, nú bara eitt talv er eftir. Í hesum møtir Helgi íslendska IM Stefan Kristjansson, sum hevur eitt rating-tal á 2476. Sjálvur hevði Helgi undan hesi kappingini 2286 í rating, men undan seinasta umfarinum er hetta økt við 26 stigum, umframt at hann hevur eitt perfomance-rating á 2532, sum er imponerandi høgt. Somikið høgt, at tað er ikki langt frá fyrsta føroyska GM-norminum nakrantíð!

### Fer altíð eftir stigi

Tá vit týsmorgunin fingu fatur á Helga, tóktist ungi telvarin at vera komin nakað fyri seg aftur. Krímið var ikki heilt so ógvusligt longur, og hann tóktist veruliga gleða seg til at fara í holt við seinasta talvið.

Hóast nógv hóvaták hevur verið gjørt her í Føroyum, so tykist Helgi sjálvur tó at hava bæði beinini væl og virðiliga plantað á jørðini.

– Undan kappingini hevði eg sett mær sum mál, at eg skuldi vinna ein IM-norm afturat, og tað er so tað, sum eg havi hildið fokus á alla tíðina. Og eg eri sera fegin um, at hetta nú hevur eydnast, staðfestir hann.

*Men hevði tú droymt um, at úrslitini skuldu vera av slíkum slag, at tey nærum skuldu røkka til GM-norm eisini?*

– Nei, als ikki. Men tað er so ikki nakað, sum eg hugsi serliga nógv um. Eg hava helst bara havt marginalarnar við mær hesaferð, og so havi eg bara tikið eitt talv í senn, heldur hann.

Og hann leggur afturat, at tað ikki býr nøkur serstøk ella óvanlig fyrireiking aftan fyri úrslitini.

– Tað er jú ikki so, at tú kanst fyrireika teg til, hvussu tú skalt fella ein telvara við GM-normi. At teir eru somikið sterkir, er jú júst tí, at teir eru sterkir innan allar partar av spælinum, so tað er ikki so nógv, sum tú kanst gera í so máta. Eg royni sjálvandi at fáa stig, hvørja ferð eg fari at borðinum, og hesa ferð hevur tað so eydnast rættiliga væl. Eisini mótstøðan hevur verið serstakliga sterk, sigur hann.

### Ein kapping í senn

Tað er ikki bara í Føroyum, at tosið um unga telvaran hevur verið stórt. Mongu sterku telvararnir í kappingini hava eisini havt hug at róst Helga, sum tó á ongan hátt tykist hava tikið sær hetta nærri, enn gott er.

Stjørnunykkur tykjast í øllum føurm vera langt burturi, og enn eru tankarnir als ikki farnir út um tað, sum gongur fyri seg í kappingini í íslendska høvuðsstaðnum. Eisini tá spurt verður, hvørji mál hann hevur sett sær eftir góðu vikuna í Reykjavík.

– Eg ætli mær sjálvandi at fáa triða IM-normin, og helst skal hann koma í ár.

*Hvørjar kappingar hevur tú fyri framman, sum kunnu geva ein slíkan?*

– Tað veit eg ikki rættiliga. FM-kappingin verður skjótt, men har er so eingin normur at vinna. Men vónandi verið eg við á OL-landsliðnum, og so havi eg kanska møguleikan.

– Hvørjar aðrar kappingar verða á skránni, veit eg ikki við vissu. Fyrst og fremst, so royni eg at hugsa um kappingina, sum eg eri partur av, og tí hugsi eg bara um Reykjavík í løtuni. So kann eg fara at hugsa um aðrar kappingar, tá eg eri komin heimaftur.

*Og hvussu er kenslan nú, tú skjótt fer úr Íslandi. Ert tú ikki errin av at hava fingið slík úrslit, sum alt landið hevur tosað um hesa vikuna?*

– Errin veit eg ikki, um eg kann siga. Tað er í øllum førum ein góð kensla, sum eg siti við. Fyrst og fremst, tí eg rakk málinum, sum eg setti mær undan kappingini. Og so er tað bara stuttligt, at tað skuldi ganga so framúr væl, sum tað hevur gjørt higartil, sigur lítillátni havnarmaðurin at enda.

# Eitt eindømi í føroyskari talvsøgu

**– Millum føroyskar telvarar eru tað bara John Rødgaard og John Arni Nilsen, sum koma í nær námind avrikinum, sum Helgi hevur framt hesa seinastu vikuna, sigur Carl Eli Nolsøe Samuelsen, talvviðmerkjari og verandi føroyameistari**

TALV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Carl Eli vann fyri einum ári síðani FM-kappingina fyri einstaklingar, og hann hevur í nógvar mátar verið fastur partur av føroyska talvheiminum í skjótt fleiri ár.

Men hann slær skjótt fast, at eitt slíkt avrik, sum tað hjá Helga, er nakað heilt, heilt óvanligt.

– Eitt er, at tú klárar at fella ein stórmeistara. Tað kann sjálvandi koma fyri væi eini blanding av hepni og dugnaskapi. Men Helgi hevur altso hitt f‡ra stórmeistarar og ein altjóða meistara, og enn hevur hann yvir 50% í skoru. Bara tað, at hann við svørtum megnar at halda remis móti somikið sterkum telvarum, er heilt ótrúligt. Skal sammetast við onnur føroysk úrslit, so eru tað væl bara John Rødgaard og John Arni Nilsen, sum hava verið í nær námind slíkum úrslitum. Hann hevur veruliga telvað, sum ein altjóða stórmeistari, og tí er hetta fullkomuliga eitt eindømi innan føroyska talvsøgu, sigur Carl Eli.

### Ivast ikki í IM-heitinum

Longu í fjør v til kennar, at tey kundu hugsað sær høllina her. er tað longu nú rættiliga sannlíkt, at Helgi innan alt ov langa tíð verður okkara næsti IM-telvari. Ein møguleiki, sum Carl Eli roknar við kemur heilt skjótt.

– Tað krevjast jú tríggir IM-normar og eitt rating-tal oman fyri 2400, um tað skal náast. Normarnir eru skjótt allir heima, og telvar hann eins væl komandi tíðina, sum hann hevur gjørt tað í Reykjavík, so økist rating-talið eisini heilt skjótt. Bara hesa seinastu vikuna man hann hava fingið eini 40 stig afturat, og so eru bara eini 60 eftir, áðrenn hann hevur nátt teimum 2400.

### Favorittur til FM

Tá kappingin í Reykjavík er løgd aftur um bak, munnu eyguni hjá Helga skjótt fara at vendast móti Føroyum, har FM-kappingin stendur á skránni um páskirnar. Ein FM-kapping, har Carl Eli ikki ivast í, at tað verður serstakliga trupult at verja sítt FM-heiti.

– Soleiðis sum Helgi hevur ført seg fram, so er væl eingin ivi um, at hann er favorittur at vinna ta kappingina. Hansara størsti trupulleiki kann kanska verða, at tað tá eru »vanligir« føroyskir telvarar, sum hann skal kappast við, og tað kann merkja motivatiónina. Og í øllum førum ætli eg mær at geva honum harða kapping, ljóðar tað heldur speiskliga.

– Men líkamikið, hvussu gongur hjá honum tá, so ivist eg ikki í, at skjóta framgongdin hjá honum fer at standa við. Persónliga er hann eisini mentir sera nógv seinastu tíðina, og í dag fer hann als ikki niður við høvdinum, bara tí hann fær okkurt bakkast. Heldur tekur hann slík sum avbjóðingar, sum hann roynir at vinna á, og við tí hugburðinum kann tað næstan bara ganga rætta vegin, sigur Carl Eli Nolsøe Samuelsen at enda.